# Halda kósina

*StÍF lat ongan iva vera um úrslitið, tá teir leygardagin spældu móti H71, og eru tí framhaldandi við í FM-stríðnum*

JÁKUP MØRK

H71-StÍF 25-36 (11-18)

Krøvini til strandingar vóru púra greið, áðrenn teir leygardagin fóru á vøllin móti hoyvíkingum. Sigur og tvey stig skuldu fáast til høldar, um teir framhaldandi skulu gera sær vónir um at endurvinna FM, og uppgávan sáð heldur ikki ómøgulig út.

Hoyvíkingar hava alt árið verið í niðara enda av stigatalvuni, og hóast teir onkran dyst hava verið heilt nær við, so hava teir ongantið megnað at koppað nøkrum av oddaliðunum.

**Stórur munur**
Tað var eisini skjótt greitt, at strandingar als ikki ætlaðu at taka lætt upp á uppgávuna, og eftir lítlari løtu høvdu teir vunnið sær eina hampuliga trygga leiðslu.

Í fleiri av dystunum í ár hava vit sæð, at hoyvíkingar eru farnir niður við nakkanum, beinanvegin teir eru komnir aftur um við nøkrum málum, men soleiðis var kortini ikki leygardagin.

Hóast munurin rættuliga skjótt varð nakað stórur, so royndu teir meginpartin av dystinum at fáa glið á spæli. Tað var tó eisini sjónligt, at orkan ikki var eins góð, og hon var hjá strandingum, og móti endanum av hálvleikinum fóru málini av álvara at fossa inn.

Seinna umfarið byrjaði við, at hoyvíkingarnir skutu trý mál á rað, men tey, sum væntaðu at hetta var byrjanin til eitt comeback av teimum stóru, sótu vónbrotin eftir. StÍF kom nevnliga í gongd aftur, og nærri enn fimm málum komu hoyvíkingarnir ongantíð.

**Trý á rað**
StÍF vann sær sostatt tey bæði neyðugu stigini, soleiðis at teir enn eru við í stríðnum um gullkrónurnar. Eitt stríð, sum verður avgjørt komandi vikurnar, tá øll oddaliðini skulu leika innanhýsis uppgerðir.

Strandingar skulu royna seg móti ávíkavist Neistanum, VÍF og Kyndli á heimavølli, og megna teir at basa hesum trimum, fáa teir í minsta lagi silvur.

Støðan er ikki heilt ólík støðuni undanfarna kappingarár, men munurin er tó tann, at nú eru mótstøðuliðini ávaraði.

Hoyvíkingar skulu framhaldandi ansa sær, so teir ikki enda niðastir á stigatalvuni. Enn hava teir tveir dystir móti hinum báðum liðunum, sum eru í botninum, og hesir fara at gera av, um endastøðan hjá hoyvíkingunum skal eita fimm, seks ella sjey.

**Dysturin í tølum**
**Málskjúttar:**
H71: Jákup á Borg 5, Halgir Dahl Olesen 5, Eyðun H. Højgaard 5 (3), Bárður Brimvík 4, Johnny Durhuus 3, Rene Dahl Olesen 2, Allan Mørkøre 1
StÍF: Artur Johansen 9 (7), Alexandur Johansen 8, Marius Joensen 6, Pauli Hansen 4, Poli Hansen 3, Bent Durhuus 2, Jónleif Sólsker 2, Sveinbjørn Poulsen 2
**Brotskøst:**
H71 3, StÍF 7
**Útvísingar:**
H71 2, StÍF 4
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



*Alexandur gjørdi eitt gott hál leygardagin, tá hann skeyt átta av málunum hjá strandingum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Herfølge nærri gullinum

***Superligan:** Eingin av teimum trimum føroyingunum var á vøllinum, tá AGF smokkaði niður um strikuna, FCK kendi seg snýtt, og Esbjerg syrgdi fyri, at Herfølge styrkti um møguleikan fyri DM*




*Hóast teir ikki áttu dyst fyrr enn mánakvøldið, so betraði Herfølge kortini um oddastøðuna, tá næstu kappingarneytarnir, Brøndby, óvæntað máttu lúta fyri Esbjerg*

Í fyrradagin fóru teir í Danmark undir langa endaspurtin í kappingini um DM í ár 2000. Øll liðini vóru í eldinum uttan Lyngby og liðið hjá føroyska landsliðsmálverjanum, Jákupi Mikkelsen. Hesi bæði liðini hittust á Lyngby stadion í gjárkvøldið, eftir at hetta blaðið var farið til prentingar.

Tað verður ikki fyrrenn í morgin, at vit kunnu siga meiri um dystin í Lyngby, men longu sunnukvøldið kundu Jákup Mikkelsen og hinir í Herfølge staðfesta, at uttan mun til úrtøkuna móti Lyngby, so hevði vikuskiftið við sær, at Herfølge fór at standa sterkari í DM kappingini, enn teir gjørdu undan vikuskiftinum.

Sigur ella javnleikur móti Lyngby fór at hava við sær, at munurin niður til Brøndby á øðrum plássi fór at togna til sjey ella níggju stig. Um Lyngby vann, fór munurin niður til Brøndby, sum Herfølge fær vitjan av komandi sunnudag, framvegis at vera seks stig, men nú hevur Brøndby ein dyst færri at vinna munin innaftur í, og tað hevur sjálvsagt við sær, at Herfølge stendur betri í tí.

**Todi uttanfyri**
Í síðstu viku vónaði Todi Jónsson her í blaðnum, at liðbandsskaðin í knænum ikki var so álvarsligur, at hann fór at hava við sær, at Todi ikki kundi spæla í sjónvarpsdystinum í Aalborg.

Men tíverri vísti skaðin seg at vera so mikið álvarsligur, at Todi ikki fekk spælt, og tað kom illa við hjá FCK. Peter Christiansen, sum er komin frá Vejle, spældi á ytsta miðvallarplássinum í vinstru. Hann kom ikki á vøllin eftir steðgin. Tá kom suðurafrikanarin Sibusio Zuma inn í álopið.

Nýggi álopsmaðurin var sera vandamikil, og í síðstu løtu skoraði hann eitt mál. Dómarin kolldømdi fyri rangstøðu, og tað vóru FCK venjarin, Kim Brinck, og nógv onnur, sera illa nøgd við. Víst varð á, at Niclas Jensen legði innfyri frá baklinjuni í vinstru.

FCK hevði greiða yvirvág í spæli, men teir sjey túsund áskoðararnir staðfestu, at einki mál varð skorað.

**Óli uttanfyri**
AGF er illa spert í botninum í superliguni. Tá OB vitjaði, vóru teir 4.900 áskoðararnir greiðir yvir, at talan so at siga var um seks stigs dyst, tí OB hevur eisini verið millum liðini, ið hava havt stríð av niðurflytingarstrikuni.

OB skoraði, tá 28 minuttir vóru farnir, og hóast AGF hevði fleiri møguleikar, so eydnaðist teimum ikki at skora. At OB slapp úr Århus við øllum stigunum var ikki minst 41 ára gamla málverjanum, Lars Høgh, fyri at takka.

Óli Johannesen var ikki millum teir fyrstu ellivu hjá AGF, og hann varð heldur ikki skiftur inn.

**Brøndby kiksaði**
Størsti favoritturin í fyrsta umfarinum eftir vetrarsteðgin var Brøndby. Men næstu kappingarneytarnir hjá Herfølge til DM heitið heilkiksaðu, og tað vóru nógv teir flestu av teimum 16.101 áskoðarunum sjálvandi vónsviknir av.

Esbjerg, sum stríðist við niðurflytingarstrikuna, vann 3–2. Sigursmálið skoraði sviin Joakim Persson, sum akkurát er komin til Esbjerg, í yvirtíðini. Hann sendi flatt fríspark ígjøgnum bláa og gula manngarðin.

Komandi sunnudag skal Brøndby á vitjan í Herfølge, og tá er lagt upp til, at fleiri áskoðarar enn nakrantíð áður fara at hyggja at í Herfølge.

Vejle er við í stríðnum at sleppa undan niðurflyting. Tað kom illa við hjá m.a. AGF, at Vejle á heimavølli vann 3–1 á AB. Viborg og Silkeborg, sum er á triðja plássi, spældu 1–1.

JH

**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 18 | 11 | - | 4 | - | 3 | 32 | 23 | 9 | 37 |
| 2 | Brøndby | 19 | 9 | - | 4 | - | 6 | 33 | 22 | 11 | 31 |
| 3 | Silkeborg | 19 | 8 | - | 6 | - | 5 | 35 | 18 | 17 | 30 |
| 4 | AaB | 19 | 7 | - | 8 | - | 4 | 30 | 22 | 8 | 29 |
| 5 | Lyngby | 18 | 9 | - | 2 | - | 7 | 30 | 27 | 3 | 29 |
| 6 | Viborg | 19 | 8 | - | 5 | - | 6 | 26 | 26 | 0 | 29 |
| 7 | AB | 19 | 7 | - | 6 | - | 6 | 29 | 25 | 4 | 27 |
| 8 | FCK | 19 | 7 | - | 4 | - | 8 | 19 | 17 | 2 | 25 |
| 9 | OB | 19 | 4 | - | 8 | - | 7 | 16 | 25 | -9 | 20 |
| 10 | Esbjerg | 18 | 5 | - | 2 | - | 11 | 20 | 35 | -15 | 17 |
| 11 | AGF | 18 | 3 | - | 6 | - | 9 | 16 | 29 | -13 | 15 |
| 12 | Vejle | 17 | 2 | - | 7 | - | 8 | 20 | 37 | -17 | 13 |



# LÍF og ÍF stórsigrar

***Løgmanssteypið:** Tveir dystir vórðu avlýstir, og komandi vikuskifti verður avgjørt, hvørji lið skulu í bólkaspælið*

Komandi vikuskifti verður gjørt av hvørji tvey lið saman við teimum tíggju liðunum í 1. deild skulu taka lut í bólkaspælinum í kappingini um løgmanssteypið.

Fýra dystir í innleiðandi umfarinum vóru á skránni sunnudagin, men bara tveir vóru spældir. EB/Streymur skuldi spæla á Tvøroyri, men eftir syndarligu vanlukkuna har suðuri varð avgjørt at útseta. Vit hava skilt á lagnum, at tað verður arbeitt við at fáa dystin spældan komandi fríggjakvøld.

Sambært skránni skuldi Skáli havt spælt á útivølli móti Royn, men tann dysturin var av ongum, tí Skála gav avboð. Teir hugsa framvegis mest um hondbóltin.

**ÍF–AB 7–0 (2–0)**
Fuglfirðingar høvdu vitjan av nýuppflutta 3. deildarliðnum av Argjum. Jóhan Stenberg vardi málið hjá AB, og hann hevði nógv meiri at gera enn nýggi málverjin hjá ÍF, Allan Joensen.

Á liðnum hjá AB vóru m.a. Sigurd Vatnhamar, sum áður hevur spælt við LÍF, og Signar Johannesen, sum í fjør var á 1. deildarliðnum hjá B68.

Alvi Justinussen var nýggjur á ÍF liðnum. 16 ára gamli Henry Petersen kom fyri fyrstu ferð inn á besta liðið í Fuglafirði, og hann skoraði eitt mál. Beiggi hansara, Rúni Petersen, var annar av fremstu monnunum í 4–4–2 stílinum hjá Peturi Mohr, og Rúni skoraði tvey frálíka góð mál.

Serliga í 2. hálvleiki var eyðsýnt, at fuglfirðingar vóru væl betri fyri enn teir hjá Oddbirni Joensen og AB.

**LÍF–Fram 9–1 (2–0)**
Á vøllinum í Leirvík, sum er rættuliga ovarlaga, er framvegis nakað av kava. Tí gjørdu teir av at spæla í Gøtu, har vesturættin er góð.

Elsti maður á Fram liðnum sunnudagin var 22 ár. Teir flestu vóru niðanfyri 20 ár. Fótbóltsevnini tykjast vera (alt ov) góð til 4. deild. Men kropsstyrkin og venjingarstøðan vóru einki serlig.

LÍF var greitt omaná í 2. hálvleiki, og Uni Højgaard í Fram málinum noyddist níggju ferðir í netið eftir bóltinum. Einasta Fram málið fekk Terji Nielsen, sum tiltuskaði sær eitt brotsspark, sum hann skoraði uppá.

Trygvi Olsen spældi ikki í fjør, men nú venur hann málið hjá LÍF, sum vann 9–1 í fyrsta dystinum við Hans Mouritsi Foldbo sum venjara.

Leirvíkingar hava vant síðani hálvan februar, og teir tóktust vera hampuliga væl fyri.

**Komandi vikuskifti**
Sum sagt so verður arbeitt við, at EB/Streymur skal fara suður á Sevmýri fríggjakvøldið. Tað er greitt, at Royn og ÍF skulu spæla sunnudagin. Tann dysturin verður annaðhvørt í Vági ella á Tvøroyri. Tað valdast m.a. úrslitið av dystinum millum TB og EB/Streym.

Vinnarin av TB–EB/Streymi skal spæla á heimavølli móti LÍF. Fríggjakvøldið verður avgjørt, um tað verður á Mølini á Eiði ella á Sevmýri. Um tað verður á Sevmýri, so skilja vit á lagnum, at ætlanin er, at ÍF og Royn skulu spæla í Vági.

JH

Løgmanssteypið
Innleiðandi umfarið
Sunnudagin 12. mars
Royn–Skáli Royn vann uttan dyst

**TB–EB/Streymur útsettur**

**ÍF–AB 7–0 (2–0)**
1–0: Bárður á Lakjuni 5.
2–0: Rúni Petersen 40.
3–0: Rúni Petersen 51.
4–0: Ken Bærendsen 66.
5–0: Torstein Joensen 76.
6–0: Henry Petersen 83.
7–0: Alvi Justinussen 85.

**LÍF–Fram 9–1 (2–0)**
í Gøtu
1–0: Mirek Gil 15.
2–0: Mirek Gil 33.
3–0: Erik Lervig br 49.
4–0: Kristian í Vági 55.
5–0: Kristian í Vági 58.
5–1: Terji Nielsen br 61.
6–1: Jonhard Høgnesen 69.
7–1: Kristian í Vági 76.
8–1: Jonhard Høgnesen 83.
9–1: Mirek Gil 89.




# Landsliðið fer nú til Liktinstein

*Landsliðsspælararnir fáa so nógv at gera seinnapartin av apríl, sum kanska ongantíð áður*

Føroyska fótbóltslandsliðið fer at spæla altjóða skrásettan landsdyst í Liktinstein mikudagin 26. apríl. Í síðstu viku varð avtala gjørd millum FSF og fótbóltssambandið í Liktinstein um hetta. Hin parturin av avtaluni er, at Liktinstein í 2002 skal koma til Føroya at spæla landsdyst.

Vit hava áður nevnt í blaðnum, at tað hava verið samráðingar um vinardystir móti Liktinstein, men tá bendi alt á, at einki fór at spyrjast burturúr hesum.

– Tað var Liktinstein, sum spurdi seg fyri hjá okkum. Ætlanin var, at teir skuldu koma henda vegin seinni í ár ella eina ferð komandi ár, men tað bar ikki til at finna ein dag, sum passaði hjá bæði okkum og teimum. Tí er avrátt, at teir koma henda vegin í 2002. Enn hava vit ikki ásett, nær tað verður, men tá verður undankappingin til HM endaspælið liðug, og tí man tað fara at bera til at finna ein dag, áðrenn tað verður farið undir EM undankappingina til endaspælið í 2002.

Hetta sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum. Avtalan við Liktinstein er, at FSF sjálvt ber ferðaútreiðslurnar og aðrar útreiðslur, sum standast av at fara av landinum við landsliðnum. Teir í Liktinstein rinda fyri uppihaldið hjá føroyska ferðalagnum í Liktinstein. Tá Liktinstein um tvey ár kemur henda vegin, skal FSF rinda fyri uppihaldið hjá teimum, meðan teir sjálvir skulu gjalda ferðaútreiðslurnar.

Ætlanin er, at landsliðsferðalagið skal fara úr Føroyum flaggdagin, 25. apríl, og teir verða aftur í Vágum hósdagin 27. apríl.

**Nógv á skránni**
Allan Simonsen, landsliðsvenjari, fer í seinasta lagið fjúrtan dagar undan fráferðini til Liktinstein at boða frá, hvørjar spælarar hann ætlar sær at hava við. Venjarin kemur til Føroya at síggja onkrar dystir, men enn er ikki avgjørt, nær hann kemur henda vegin.

Landsliðsspælararnir eru ikki enn farnir undir kappingarárið, men Allan Simonsen fær nógvar møguleikar at síggja, hvussu landsliðsspælararnir eru fyri, áðrenn hann niðri í Liktinstein fer at seta liðið. Eitt nú eru dystir í bólkaumfarinum í kappingini um løgmanssteypið á skránni 20. og 22. apríl, og fyrsta umfarið í landskappingini verður 2. páskadag, 24. apríl, ella dagin fyri, sum landsliðið fer niður til Liktinstein.

**Grønland tikið av skránni**
Grønlendingar hava í longri tíð víst áhugað fyri at spæla landsdyst móti føroyingum. Teirra uppskot hevur verið, at talan skuldi vera um ein dyst, og at hann skuldi spælast í Keypmannahavn.

Síðsta uppskotið hjá grønlendingum var, at dysturin skuldi spælast í Parkini í Keypmannahavn mikudagin 7. juni, men nú er tað greitt, at tað verður eingin landsdystur í ár ímillum Føroyar og Grønland. Í onkrum donskum fjølmiðlum hevur verið nevnt, at grønlendingar hava hildið, at teir kundu ikki ganga undir fíggjarligu treytirnar, sum føroyingar settu fyri at fara til Danmarkar at spæla, men frá føroyskari síðu hava krøvini um endurgjald fyri útreiðslur av ferðini til Danmarkar ikki verið mett at vera órímulig.

JH

**STEYP OG HEIÐURSTEKIN**

Vit hava Føroya størsta úrval av steypum og heiðursteknum.



**Vit gravera (næstan) alt:**

- El-talvur
- Skipstalvur
- Búmerkir
- Navnaskeltir
- Termokannur
- Pennar o.a.

3arin
UR GULL SILVUR
FOTO & VIDEO
FLØGUR

SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR · TEL 355 355